# Feløg vita onki um útlendingalóg

Seinastu dagarnar er ført fram í fjølmiðlunum, at fundur hevur verið við arbeiðarafeløgini um útlendingalógina, og at Heðin Zachariassen landsstýrismaður í innlendismálum aftaná sigur seg hava góðar vónir um, at málið verður loyst. Hesa útlegging siga Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, seg onki kenna til. - Vit fingu lógaruppskotið til ummælis og sendu svar aftur til Innlendismálaráðið. Síðan hava hvørki vit ella umboð okkara í arbeiðsmarknaðarráðnum hoyrt nakað frá Innlendismálaráðnum, siga feløgini. Tey heita á landstýrisráðini, løgtingsnevndir og politikarar um, at tá ætlanin er at hoyra arbeiðarafeløg um ymiskt, at minnast til tey, sum umboða á leið helvtina av arbeiðsfólkunum í landinum.



# Árni Dam stóran russiskan heiður

**Fyri fyrstu ferð hava russar latið heiðursmerki til danskar statsborgarar og fyritøkur, sum hava havt serliga stóran týdning fyri samstarvið við Russland. Av teimum sjey, sum fingu heiðursmerki, var Árni Dam annar**

HEIÐURSMERKI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í ár eru liðin 30 ár síðani fiskiveiðisamstarvið millum Russland og Føroyar byrjaði. Hetta merkti eisini samráðingarnar hesaferð, sjálvt um viðurskiftini gjørdu, at neyðugt varð at lækka støðið í avtaluni millum londini bæði.

Ein teirra, sum øll árini hevur verið við uttan um sjálvar samráðingarnar, uttan tó at luttaka beinleiðis, er Árni Dam. Hann hevur í skjótt 40 ár umboðað russisk skip og manningar, seinastu árini gjøgnum egna umboðsfelag sítt, Faroe Agency.

- Eg fór í land av skipafelagsskipunum og inn á skrivstovuna í september 1974, og byrjaði beinanvegin at takast við umboðan av russiskum skipum. Og frá 1978 havi eg fingist burturav við hetta, greiðir Árni Dam frá.

Tað var annars beint eftir kríggið, heilt nágreiniliga 27. juni 1947, at Skipafelagið varð peikað út sum russiskt umboð í Føroyum.

- Tað var um ta tíðina, at føroyingar fóru at selja sild til Russlands, og tí var eyðvitað størri brúk fyri góðum sambandi tann vegin, sigur Árni Dam.

Hann sigur, at føroyingar sanniliga standa høgt í metum í Moskva, men at russar samstundis eru eitt framúr fitt fólkaslag.

## Fegnir um jólapakkar

Eitt, sum Árni Dam í mong Harrans ár hevur tikið sær av, er at býta jólapakkar út til russisku skipini her um leiðir.

- Hetta er nakað, sum russisku sjómenninir eru ótrúliga glaðir um, og eisini nakað, sum lagt verður til merkis á hægsta stigi heima í Moskva, sigur Árni Dam.

Tað er ikki talan um nakra skipaða innsavnan sum so, men tað eru fleiri persónar og bólkar, sum lata Árna Dam pakkar, sum hann síðani avgreiðir víðari. Og russiski umboðsmaðurin undirstrikar, at hann ógvuliga fegin tekur ímóti pakkum, skuldu fólk havt hug at latið.

Og at russar seta prís á millum annað hetta, fekk Árni Dam og restin av familjuni at sanna, tá tey í summar vóru í Danmark á veg suður eftir at halda frí.

- Tá vórðu vit biðin um at koma á samkomu við russar. Vit vórðu enntá biðin um at koma ein tíma undan hinum. Tá kom Yuri Piskarin, sum var samráðingarleiðari nú Føroyar og Russland endurnýggjaðu fiskiveiðiavtaluna, við einum 11 ára gomlum Sosiali at vísa okkum. Har varð eisini tosað um jólapakkar, sigur Árni Dam.

Hann harmast annars um, at tað ikki enn hevur eydnast at fáa handilssáttmálan við russar endaliga upp á pláss, tí hann ivast onga løtu í, at føroyingar við einum slíkum sáttmála kundu spart í hundratúsundavís av krónum upp á serliga olju og timbur. Men enn mugu vit brynjað okkum við toli í so máta.

Russar sjálvir hava ímeðan sýnt Árna Dam sum einum út av sjey persónum og fyritøkum serligan heiður við heiðursmerki sum tøkk fyri serligan innsats, fyri fremjan av samstarvi landanna millum.



*Árni Dam er ein út av sjey persónum og fyritøkum í danska ríkinum, sum kann prýða seg við serliga heiðursmerkinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 700 tons færri av toski

**Úrslitið av fiskiveiðisamráðingunum millum føroyingar og russar, sum vóru mánadagin og týsdagin, varð ein skerjing í avtaluni sum kemst av, at føroyska svartkjaftakvotan er so nógv minkað seinastu tvey árini**

FISKIVEIÐIAVTALA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað lá alla tíðina í luftini, at støðið á fiskiveiðiavtaluni millum føroyingar og russar fór at liggja lægri fyri komandi ár enn framman undan.

Og tað sermerkti eisini samráðingarnar hesaferð, at føroyska svartkjaftakvotan er minkað 40% seinastu tvey árini, umframt at makrelkvotan lækkaði 10% í ár. Og tá føroyskur svartkjaftur er beinleiðis grundarlagið undir avtaluni við russar, mátti hetta ávirka.

Úrslitið gjørdist tískil, at svartkjaftakvotan hjá russum í føroyskum sjógvi minkaði 20.000 tons, úr 140.000 tonsum niður í 120.000 tons. Semja var kortini um at varðveita makrelkvotuna á verandi 8.700 tonsum.



*Samlaðu føroysku og russisku samráðingarnevndirnar avmyndaðar uttanfyri Faroe Agency, eftir at Árni Dam hevði boðið til smyrjibreyð undir samráðingunum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Afturfyri hetta fáa føroyingar tosk í russiskum sjógvi. Kvotan fyri síðsta ár var 11.000 tons, men orsakað av skerjingunum í svartkjaftinum minkaði toskakvotan við 700 tonsum, niður í 10.300 tons fyri komandi ár. Hinvegin er hjáveiðan av botnfiski hjá føroyskum skipum í russiskum sjógvi hækkað úr 5% upp í 10%.

Sum longu nevnt var framman undan væntandi, at støðið á avtaluni fór at minka, og tí kom tað heldur ikki óvæntað á hjá vinnuni í Føroyum.

- Sjálvandi hevur hendan skerjingin nógv at siga fyri tey skip, sum fiska í Barentshavinum, men politiski boðskapurin til hesar samráðingarnar var, at svartkjaftin til russar skuldi niður, og hetta gjørdist so úrslitið, segði Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum, við Rás2, tá samráðingarar vóru lidnar.

Spurdur, um hetta ikki kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri skipini í Barentshavinum, segði Jákup Sólstein við Rás2:

- Jú, um hetta verður politiski boðskapurin, sum vit senda russum frameftir, so fer tað at føra munandi skerjingar við sær. Men hetta er so ein politiskur spurningur, sum vinnan má taka upp innanhýsis.